# Ísfjall losnar í Grønlandi

Eitt ovurstórt ísfjall er um at losna úr innlandsísinum í Norðurgrønlandi. Ísfjallið er 160 ferkilometrar til støddar, siga kanadiskir serfrøðingar. Tað skrivar heimasíðan hjá Kringvarpi Føroya. Risastóra ísfjallið liggur við Ellesmere Island í Kanada og hevur eina stóra rivu. Ísfjallið fer at losna og fara við streyminum næstu ferð, ísurin flytur seg, vænta íseygleiðarar. Fyri einum ári síðan reiv eitt annað stórt ísfjall seg leyst í Norðurgrønlandi. Ísfjallið var tá 1300 ferkilometrar. Í dag er tað ísfjallið 12 ferkilometrar og liggur á fjørðinum við Nunavut.



# Kunningarátak um marglætisferðir

Í hesi vikuni kemur ferðaskrivstovan Nazar til Føroya og bjóðar til eitt charterkvøld saman við ferðaskrivstovuni Fonn Flog. Kunningarfundurin verður á Hotel Klaksvík hóskvøldið 11. juni kl. 20 og í Mentanardeplinum í Runavík fríggjakvøldið kl. 21. Møguleiki verður at heilsa uppá Bettinu frá Nazar, og seta henni viðkomandi spurningar. Hon fer samstundis at leggja summarkatalogið 2009 fram. Nazar er einasta luksuscharterfelag í Danmark og er í stórum vøkstri. Eisini er Nazar partur av heimsins størsta ferðasamtaki, TUI, sum Star Tour eisini er partur av. Kunningarkvøldið er ókeypis.

# Hópupp-sagnir á Tvøroyri

**Í gjár hava fleiri starvsfólk hjá Tvøroyrar Kommunu, fingið ætlanarskriv um uppsøgn**

UPPSAGNIR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyrar Kommuna er komin í álvarsliga klemmu, tí at inntøkan av skatti og øðrum er so nógv minni, enn roknað varð við tá ið fíggjarlógin varð samtykt.

Tí hevur býráðið verið noytt til at seta umfatandi sparingar í verk.

Stóri trupulleikin er tann, at frammanundan var onki sett av til íløgur í kommununi í ár og sostatt ber ikki til at spara við at útseta ella strika ætlaðar útbyggingar.

Av tí sama skal alt sparast í sjálvum rakstrinum og tað gerst ikki uttan at siga fólki upp.

Men ein stórur partur av útreiðslunum eru lógarbundnar, so sparingar skulu setast í verk á økjum, sum ikki eru lógarbundin.

Í hesum sambandi fingu fleiri starvsfólk hjá kommununi í gjár skriv um, at ætlanin er at siga tey úr starvi, ella um, at tey verða sett niður í starvstíð.

Tilsamans eru eini 14 fólk sett upp, umframt at nøkur eru farin niður í starvstíð.

Men øll arbeiða ikki fulla tíð og tilsamans er talan um níggju ársverk, sum verða spard burtur í kommunala geiranum á Tvøroyri.

Í onkrum føri er talan um fólk, sum hava arbeitt hjá kommununi í ein mansaldur.

Býráðið sigur, at í ár er ætlanin at spara 2,2 milliónir, men býráðslimir siga, at batna útlitini ikki, mugu enn fleiri sparingar setast í verk næsta ár.

Sparingarnar raka øll øki hjá kommununi.

Tekniska økið er hart rakt við fleiri uppsagnum, men eisini trivnaðarøkið er hart rakt. Eitt nú er frítíðarskúlin farin í helvt. Tað hava verið pláss fyri 40 børnum í frítíðarskúlanum, men hereftir verður bara pláss fyri 20 børnum og her verður tað børn í fyrsta flokki, sum fáa framíhjárætt.

Barnagarðurin á Tvøroyri er kanska tann einasti í landinum, sum hevur bjóða børnunum heitan mat á miðdegi, men tann tænastan er nú eisini spard burtur.

Á býráðsfundi á Tvøroyri í gjárkvøldið førdi Jaspur Vang fram, at ein orsøk til, at Tvøroyrar Kommuna er komin í hesa ólukkuligu støðu, er, at fíggjarstýringin hevur verið ov lin.

Hann vísti á, at seinastu fýra árini er inntøkan hjá kommununi hækkað 1,2 millión, men sjálvur rakstsurin er hækkaður heilar 10 milliónir.

Bara umsitingin hjá býráðnum er blivin tríggjar milliónir dýrari hesi seinastu árini.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, ásannar, at rakstsurin er "eksploderaður", sum hann málbar seg.

Í hesum sambandi hava býráðslimir serliga heft seg við, at útreiðslurnar til barnaverndarøkið og tað, sum annars hoyrir undir sosialu deild, er hækkað ómetaliga nógv og býráðið fer í næstum at taka stig til at tálma tær útreiðslurnar. Í hesum sambandi skal fundur vera í næstum við leiðaran á sosialu deild fyri at kanna møguleikarnar fyri at tálma útreiðslurnar.



*Tvøroyrar Kommuna vil ikki sleppa vónini um at fáa havnargjald fyri Smyril, men nú er endaligt avslag komið frá Johan Dahl, landsstýrismanni og sostatt verður málið lagt fyri rættin*

# Tvøroyrar Býráð krevur 10 milliónir

**Býráðið hevur uppgivið at fáa avtalu við landsstýrið um havnargjald fyri Smyril, so nú verður stevnt eftir gjaldinum fleiri ár aftur í tíðina**

STEVNING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú hevur Tvøroyrar Býráð uppgivið at fáa avtalu við landsstýrið um at Smyril skal betala havnargjald fyri at sigla inn á Trongisvágsfjørð.

Men býráðið hevur alt annað enn uppgivið at fáa peningin.

Tí hevur býráðið nú samtykt at stevna eftir pengunum.

Nú fer býráðið sostatt at tosa við sakføraranum um, hvagar stevningin skal sendast, um tað verður Strandferðslan, sum verður stevnd, ella um tað verður landsstýrið ella bæði.

Men tað er eisini greitt, at býráðið fer at krevja havnargjald fleiri ár aftur í tíðina heilt aftur til 2005, tá ið nýggi Smyril varð settur í sigling.

Og tilsamans er kravið yvir 10 milliónir krónur.

Sum tað sæst í grein á síðu sjey, hevur hendan ósemjan um Smyril ført við sær, at býráðslimirnir á Tvøroyri í fyrstu syftu fingu bót, men nú er so bótin strikað aftur.

## Roynt í fleiri ár

Líka síðani nýggi Smyril kom, hevur Tvøroyrar Býráð tvíhildið um, at tað hevur rætt til at krevja havnargjald frá skipinum.

Men tað hevur landsstýrið ongantíð viðurkent.

Býráðið hevur roynt at fáa avtalu við skiftandi landsstýrisfólk á økinum um havnargjald, men tað hevur ongantíð eydnast.

Nú er Strandferðslan flutt undir vinnumálaráðið og býráðið hevur eisini roynt at fáa avtalu við Johan Dahl, landsstýrismann.

Men nú hevur landsstýrismaðurin endaliga boðað býráðnum frá, at Vinnumálaráðið metir ikki, at Tvøroyrar Býráð hevur rætt til havnargjald fyri Smyril.

Vinnumálaráðið vísir til, at tað er landið, sum hevur bygt samferðsluhavnina á Krambatanga og sum skal røkja hana.

Vinnumálaráðið staðfestir, at tá ið havnin á Krambatanga varð gjørd, varð upplýst í viðmerkingunum til lógina, at talan er um eina landshavn. Upplýst varð eisini, at hetta fór at hava fíggjarligar avleiðingar fyri Tvøroyrar Kommunu, tí hon missir havnargjaldið við tað, at siglingin á kommunalu havnina á Drelnesi verður niðurløgd.

Sostatt kann landið ikki rinda havnargjald fyri Smyril, fyrrenn Løgtingið hevur samtykt eina nýggja lóg um hetta, staðfestir Johan Dahl.

## Vevja tvey hugtøk saman

Men Tvøroyrar Býráð staðfestir, at Vinnumálaráðið hevur vavt tvey hugtøk saman í ein greyt.

Hann sigur, at bryggjugjald og havnargjald eru hvør sítt.

- Bryggjugjald verður kravt fyri at leggja at bryggju, men vit ætla ikki at krevja bryggjugjald fyri Smyril fyri at brúka havnarlagið á Krambatanga, staðfestir Kristin Michelsen, borgarstjóri.

Hinvegin tvíheldur hann um, at øll skip hava skyldu at betala havnargjald fyri at koma inn á fjørðin.

- Bryggjan á Krambatanga er ikki ein havn, men ein bryggja og tað er hvør sítt, sigur hann. Bryggjan á Krambatanga er sostatt ein landsbryggja inni í eini kommunalari havn, leggur hann afturat.

Tí tvíheldur býráðið um, at Smyril skal betala havnargjald og tað er nú ein spurningur, sum dómsvaldið sleppur at taka støðu til.